

## Pedagogfelagið stuðlar Barnabata

Í sambandi við aðalfund Pedagogfelagsins leygardagin 24. februar kl. 10, fer felagið undir eina heldur óvanliga innsavning við tí endamáli at stuðla Barnabata.
Pedagogfelagið kann í ár halda sín 25-ára føðingardag, og vil felagið seta dám merkisárið. Millum annað við at lata limum felagsins vakrar og sermerktar troyggjur til keyps, har 30 krónur av hvørjari seldari troyggju fer til Barnabata.
Pedagogfelagið hevur áður stuðlað Barnabata, og vil fegið gera tað einaferð enn, ásannandi tað stóra arbeiðið, felagsskapurin ger.
Formaður Pedagogfelagsins, Jarvin F. Hansen, hevur kunnað nevndina hjá Barnabata um hugskotið, sum fegnast um ein kærkomnan stuðul.

## Frá halli til javnvág

Smyril Line, sum hevur havt stórt hall tey seinastu árini, fer í næstum at kunngera ein roknskap, sum vísir, at nú er javnvág ímillum inntøkur og útreiðslur. Tað má sigast at vera ein skjót vend, tí so seint sum í fjør hevði felagið 50 mió. krónur í halli. Thomas Magnussen, stjóri, sigur við Útvarpið, at tað er kortini neyðugt at umfiggja lánini í Norrønu. Eftir núverandi treytum verða tey útgoldin um ellivu ár, men tann tíðin skal leingjast.

# Illveðrið gjørdi um seg

**Illveðrið í gjár gjørdi skaðar á bæði bilar og hús. Millum annað endaðu bæði ein lastbilur og ein bussur við síðuna av vegnum, og í Klaksvík fingu fleiri hús smáskaðar av nógva vindinum**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Um náttúrðatíð í gjár feyk hesin bussurin av vegnum omanfyri Kvívík. Hann stóð parkeraður við eina rætt, men varð blástur niðan av vegnum*
Mynd: Birgir Waag Høgnensen



*Klokkan knapt fýra fekk løgreglan fráboðanina um lastbilin, sum fór út av vegnum omanfyri Norðskála í illveðrinum í gjár*
Mynd: Rólant Waag Dam

Í gjáramorgunin var vindurin nógvur í Klaksvík. So mikið nógvur, at hann gjørdi skaða á fleiri hús. Av løgreglustøðini har verður sagt, at tey fingu fimm fráboðanir um skaðar orsaka av vindinum.

Beint fyri hálvgum níggju komu fyrstu fráboðanirnar, og eftir tað hevði sløkkiliðið nokk at tríva í. Fyrsta fráboðanin var, at ein takpláta loysnaði kring skorsteinin á læknahúsunum á Brekku. Trý korter til níggju bognaði ein stálskorsteinur á einum sethúsum á Heykavegi.

Klokkan hálvgum ellivu loysnaði takskeggið á einum sethúsum í Mylnutúni, og um døgurðatíð loysnaðu nakrar tekjur á Klaksvíksvegi. Síðani hasaði keðiliga veðrið av so nøkulunda, men klokkan hálvgum fimm kom seinasta fráboðanin til løgregluna í Klaksvík, tá ein veggpláta reiv seg leysa á einum sethúsum á Nýggjavegi.

– Eingin skaði stóðst sum so. Nakrar plátur høvdu hug at ríva seg leysan, men talan var bert um smáskaðar, verður sagt av løgreglustøðini í Klaksvík, tá vit biðja tey taka saman um skaðarnar eftir illveðrið í gjár.

### Tekja loynsaði í Sandavági

Eisini aðrastaðni í landinum merktu tey ógvusliga vindin. Um middagsleitið í Sandavági loysnaði ein tekja á einum sethúsum. Hesum slapp Vága bjargingarfelag at taka sær av.

Í Kollfjarðardali fekk tekjan á Statoilstøðini nakað av skaða, so her fekk Kollafjarðar bjargingarfelag boð um at koma.

### Bussur og lastbilur útav

Ikki bara vindurin var nógvur og gjørdi fortreð. Koyrilíkindini vóru eisini vánalig kring landið. Í ringu líkindunum fór ein bilur hjá Farmaleiðum út av vegnum oman fyri Norðskála. Hetta var beint fyri klokkan fýra.

Trý fólk vóru í bilinum, sum fór niðan av vegnum nakað niðan fyri rundkoyringina. Av teimum trimum varð ein kvinna flutt á Landssjúkrahúsið til nærri kanningar.

Og seinasta fráboðanin til løgregluna í gjár, var um ein annan stóran bil, sum var farin út av vegnum. Henda fráboðanin kom, tá klokkan var farin beint av seks. Hetta var um ein buss, sum feyk av vegnum omanfyri Kvívík. Hann stóð annars parkeraður við eina rætt, men vindurin tók stóra bussin og blásti hann niðan av vegnum.

# Eitt árs fongsul fyri 130 gramm av amfetamin

**Ein 52 ára gamal klaksvíkingur varð í Føroya Rætti í gjár dømdur eitt árs fongsulsrevsing fyri at hava keypt 130 gramm av amfetamin**

DÓMUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Málið var fyri Føroya Rætti fyri viku síðani, har maðurin varð skuldsettur fyri at hava keypt amfetamin bæði í Havn og Keypmannahavn.

Ákærin helt upp á, at maðurin hevði keypt 130 gramm av amfetamin í Havn, og at tað var við víðari sølu fyri eyga. Amfetaminið hevði hann keypt fyri tilsamans 14.000 krónur.

Sosialurin var í rættinum í farnu viku, tá málið var fyri og maðurin játtaði seg sekan. Tá legði hann tó dent á, at amfetaminið var bara til egna nýtslu, og at hann ikki hevði ætlanir um at selja rúsevnini víðari. Somuleiðis segði hann, at talan ikki var um 130 gramm, sum hann hevði keypt, men 115 gramm.

Dimmalætting skrivaði í gjár, at dómarin ikki trúði manninum, sum nú er dømdur fyri at hava keypt 130 gramm av amfetamin. Dimma skrivaði somuleiðis, at dómurin eisini segði, at hald skuldi leggjast á pening, amfetamin, hassj, amfetaminleivdir, útgerð og annað, sum funnið varð undir húsarannsóknini, ið varð gjørd seinasta ár heima hjá manninum og umborð á skipinum, hann sigldi við.

### Dómurin eitt fordømi

Enn er ikki greitt um maðurin tekur við dóminum ella ikki, tí hvørki hann ella sakførari hansara møttu í rættinum í gjár.

Sambært Útvarpinum kundi maðurin havt vunnið sær omanfyri 80.000 krónur, um hann seldi amfetaminið víðari. Hetta tí at sluprísurin á gøtuni er 700 krónur fyri grammið.

Somuleiðis segði Útvarpið, at ákæruvaldið hevði bíðað við spenningi eftir dóminum, tí hann kann gerast eitt fordømi. Higartil hava teir flestu dómarnir í slíkum málum verið um ólógligan innflutning, men hesin dómurin kann gerast eitt fordømi við, at hann kann leggja støði fyri øðrum dómum, har amfetamin er keypt á gøtunii Føroyum.

- Í fyrstu atløgu eri eg nøgd við dómin, tí hann liggur innan fyri tann karm, sum vit vónaðu, segði Linda Hesselberg, ákæri, við Útvarpið í gjár.



*Føroya Rættur dømdi ein 52 ára gamlan mann eitt ára fongsul í gjár*